# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali

**Partur 11**

Jógvan hevur ikki meira enn lagt telefonina frá sær, so ringir aftur onkur og sigur, at jólagávurnar eru stolnar. Og nú eru fólk eisini farin at koma inn á politistøðina. Ein familja fyri og onnur eftir. Øll rópa í holið á hvørjum øðrum. Foreldurini eru uppøst, og nógv børn gráta. Tað er jólaaftan, og allar gávurnar eru stolnar.



- Hvat er hetta fyri nakrir politistar, sum vit hava, rópar ein óður pápi.

- Nú nú, sigur Jógvan, kom ikki ov væl í gongd, hann sjálvur.

- Vit vilja hava gávurnar aftur, og tað skal verða nú, sigur ein mamma við gráturødd.

Nú eru so nógv fólk inni á politistøðini, at har rúmast ikki fleiri. Øll rópa, so har hoyrist ikki mannamál, og telefonin ringir og ringir. Jógvan sær ongan annan útveg, enn at fara upp á borðið.

- HALLO HEY HEY – TIGIÐ NÚ!

Tá fólkini síggja, at Jógvan stendur uppi á borðinum, dempa tey seg so mikið nógv, at Jógvan kann siga tað, sum hann hevur upp á hjarta.

Jógvan andar djúpt inn.

- Hetta er ein ræðulig støða at koma í. Vit eru øll kedd um, at hetta er hent, men eg skal lova tykkum, at eg og Erling fara at gera alt, vit eru mentir at fanga tjóvarnar. Men fyrst mugu eg og Erling fáa eitt yvirlit yvir støðuna. Vit fara beinanvegin í gongd við at kanna hetta stóra mál. Vinarliga farið til húsa aftur. Henda sak er í tryggum hondum.

Fólkini mutla sínamillum, men so við og við fara tey út aftur av politistøðini, og tá ein løta er farin, eru bara Jógvan og Erling eftir.

- Hetta var ein ræðuligur dagur at vakna upp til. Og eg sum hevði glett meg til ein hugnaligan og stillan dag, suffar Jógvan, meðan hann setur seg á stólin við sítt skrivaraborð.

- Ja, hetta er ræðuligt. Men hvør heldur tú tað er, sum hevur stolið allar gávurnar, spyr Erling og setir seg á borðkantin á skrivaraborðinum hjá Jógvani.

- Eg veit ikki. Kúlla Karl heldur jól í Danmark í ár, so tað er ikki hann. Leikamafian er ikki í Føroyum, so tað eru heldur ikki teir. So eru tað trøllini. Trølla Omman, hon kann jú finna upp á alt møguligt. Men hin vegin, so hevur hon skikkað sær væl í langa tíð. Men lat okkum fyri ein ordans skyld leggja leiðina fram við hjá trøllinum. Um tey ikki hava stolið gávurnar, so kann tað verða at tey vita okkurt.

- Ja, lat okkum tað Jógvan, sigur Erling.

Inni hjá trøllinum er hugnaligt. Trølla Omman steikir kleynur, og Trølla Pætur situr við køksborðið og lesur eina jólasøgu. Hann lesur søguna so mikið hart, at Trølla Omman kann eisini hoyra. Tey eru sum verða mann sera glað, og omman roynir at gera alt fyri, at Trølla Pætur skal fáa ein góðan og spennandi dag sum gjørligt.

*Puntur 15 til jólakalendaran*



